# Broyting í byggisamtyktini fyri Eysturkommunu

## Ískoyti til: **§ 15. Ásetingar fyri økið G2: Neysta- og vinnuøki við serstakari byggisamtykt.**

*Stk. 6 Neystaøkið G2, íroknað Tyrlhúsgrundin og suðeftir, millum Tollaksgøtu og Tróndargøtu verður umfatað av eini serstakari byggisamtykt sum víst í kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1 og tekstin niðanfyri:*

1. *Grundøkið, ið eru umfatað av serstøku byggisamtyktini, er partur av matrikul 187a í Norðragøtu.*

2. *Neyst í Tyrlhúsgrundini, víst á kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1, mugu ikki verða bygd í meira enn í einari hædd, við nýttum lofti og ikki hægri enn 5,50 m til mønuna mált frá gólvinum í neystinum.*

3. *Neyst í øki 1, víst á kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1, mugu ikki verða bygd í meira enn í einari hædd, við nýttum lofti og ikki hægri enn 5,50 m til mønuna mált frá gólvinum í neystinum.*

4. *Neyst í øki 2, víst á kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1, mugu ikki verða bygd í meira enn í einari hædd, við nýttum lofti og ikki hægri enn 6,00 m til mønuna mált frá gólvinum í neystinum.*

5. *Neyst í øki 3, víst á kortskjali og støðumynd av neystaøki í Norðragøtu, tekning nr. A.1, mugu ikki verða bygd í meira enn í einari hædd, við nýttum lofti og ikki hægri enn 7,00 m til mønuna mált frá gólvinum í neystinum.*

6. *Neystini kunnu í mesta lagi verða 10,5 metrar lang, og at byggilinjan verður sett av kommununi.*

   *Hæddin á gólvinum, verður ásett av byggimyndugleikanum.*